| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 24. september 2009 |
| Býráðsfundur nr. | 08/2009 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2009 tann 24. september kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 18. september 2009 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 41/2009.**

**Umsókn frá Sonna á Horni um farloyvi úr býráðnum.**

Borgarstjórin hevur tann 16. september 2009 kl. 20.42 móttikið teldupost frá Sonna á Horni, býráðslimi, har hann heitir á býráðið um farloyvi fram til juni 2010, grundað á at hann er fluttur til Noregs og verður komandi árið búsitandi í Sandefjord.

Í sambandi við hetta mál hevur býráðsskrivarin gjørt upprit, dagfest 18. september 2009 um viðurskiftini.

Vísandi til § 26, stk. 4 í løgtingslóg nr. 44 frá 29. juni 1972 um val til allarføroyskar komunur við seinni broytingum stendur. "Um limur fyribils sigur frá sær fasta bústað sín í kommununi, kann verða samtykt, at hann fer úr bygda(r)ráðnum/býráðnum, inntil hann aftur tekur fastan bústað í kommununi".

Staðfest verður í hesum føri, at viðkomandi flytir úr kommununi í aðra kommunu, í hesum føri uttanlanda, og er hann tessvegna ikki longur borgari í Fuglafjarðar kommunu og tessvegna ei heldur grundað á hesi viðurskifti kann verða sitandi sum fólkavaldur býráðslimur.

Tí verður sambært § 26, stk. neyðugt, at býráðið viðgerð umsókn hansara um farloyvi eftir vallógini og ikki eftir løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og veitir honum farloyvi, sum biðið verður um fram til 01. juni 2010, og at býráðið somuleiðis tekur avgerð um, at varalimur hansara tekur sæti í býráðnum í farloyvistíðini.

Varalimurin tekur síðan sæti í býráðnum eftir, at ráðið hevur tikið avgerð um at veita Sonna á Horni farloyvi til 01. juni 2010. Annars er metingini hjá fyrisitingini, at Listi D, sum Sonni varð valdur inn á, heitir á varalimin um at møta á býráðsfundinum 24. september 2009, og at hesin fær útflýggjað býráðsskránna saman við undirliggjandi skjølum skjótast møguligt, so hann kann seta seg inn í málini í góðari tíð frammanundan.

Sambært gerðabókini hjá kommunuvalnevndini valdagin 12. november 2008 er Jóhan Heri Joensen 1. varalimur við 32 atkvøðum (31 í Fuglafirði og 1 á Hellunum), 2. varalimur er Bjørghild Arnholdtsdóttir við 30 atkvøðum, meðan Mortan Berjastein er 3. varalimur við 29 atkvøðum.

Annars hevur Magnus S. Midjord vegna lista D tosað við Jóhan Hera Joensen 1. varalim tann 18. september 2009, eins og býráðsskrivarin var hjástaddur, men hesin sigur seg ikki taka sæti í býráðnum í farloyvistíðini við grundgevingum.

Vísandi til hesa avgerð hevur býráðsskrivarin sent málið til løgfrøðisliga meting hjá Bárði Larsen á Kommunusamskipan Føroya tann 21. september 2009.

Við telduposti, dagfestum 23. september 2009 boðar Bárður Larsen frá, at hann ikki kann finna nakrar reglur í kommunustýrislógini ella kommunuvallógini, sum rakar beint á hesa støðuna, tá ið kommunustýrislimur fer frá eftir reglunum í § 26, stk 4 í kommunuvallógini. Í kommunuvallógini § 24, stk. 1, er regla um, at kommunustýrið kann játta umsókn frá persónum, sum vegna ringa heilsu, starv ella virki teirra hava góða grund at biðja um at sleppa undan vali. Henda grein skuldi kunna rakt

støðuna, men trupulleikin er bara, at nevnda grein hevur bert við støðuna við sjálvt valið at gera og ikki eftirfylgjandi, sum nú at ein limuir fyribils skal frá vísandi til § 26,1.

Sambært niðurstøðuni hjá løgfrøðinginum verður sagt, at lógin ikki beinleiðis heimilar, at næsti valdi á lista D Jóhan Heri Joensen kann bera seg undan. Hinvegin mátti ein endam+alstulking borið til at latið hann sloppið undan við at tulka støðuna eftir somu reglu sum er § 24, stk. 1, tí hann líkur eftir øllum at døma onkra av treytunum "vegna ringa heilsu, starv ella virki teirra". Ein tílík tulking er sjálvandi ikki 100% eftir bókini.

Býráðsskrivarin hevur tosað við Hilmar Høgenni í Innlendismálaráðnum tann 23. september 2009, sum somuleiðis vísir til § 22 og 24 í kommunuvallógini eins og Bárður, sí annars upprit, sum sent er býráðslimum í telduposti, eins og víst verður til fund, sum býráðsskrivarin hevur havt við Jóhan Hera Joensen tann 23. september 2009, har hesin fekk býráðstilfarið útflýggjað, eins og hann grundgevur fyri ikki at møta sum varalimur á lista D í farloyvistíðini hjá Sonna á Horni.

**Avgerð:**
Samtykt varð at veita Sonna á Horni farloyvi úr býráðnum fram til 01. juni 2010 hetta sambært umsókn. (8-0). Somuleiðis varð samtykt, at Bjørghild Arnholdtsdóttir, sum er 2. varalimur á lista D tekur sæti í býráðnum fyri Sonna á Horni í farloyvistíðini, t.v.s. fram til 01. juni 2010. (8-0).

**<u>Mál nr. 42/2009.</u>**

**Viðvíkjandi gerð av prospekti til pelagiskt matvøruvirki.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Farec International, dagfest 15. september 2009 um gerð av uppskoti til prospekt, sum umfatar eitt pelagiskt konsumvirki á havnarlagnum í Fuglafirði.

Sambært avtalu við borgarstjóran sama dag verður uppskot viðlagt, sum hevur til **endamál**:

1. Fuglafjarðar kommuna ynskir at økja um aktivitetirnar í kommununi, og tí ynskir kommunan at fáa eitt pelagiskt kunsumvirki á havnarlagnum, somuleiðis sum kommunan hevur eitt øki tøkt til tílíkan bygning.
2. Prispektið skal verða nýtt til at skapa áhuga fyri pelagiskum konsumvirki á havnarlagnum í Fuglafirði, og tað skal vísa at (ella um), tað er grundarlag fyri einum pelagiskum konsumvirki í býnum.
3. Projektið verður skrivað á føroyskum og enskum.
4. Tilfarið skal kunna brúkast til marknaðarføring av Fuglafjarðar havn (faldara vm.).

**Uppgávan:**
Prospektið skal verða nýtt til samskifti við:

- Potentiellar íleggjarar í Føroyum og uttanlanda
- Fíggingarstovnar o.t.
- Almennar myndugleikar.

Síðan verður greitt frá innihaldi í 9 pørtum, og at samsýningin verður avtalað til kr. 250.000,00, harav tær kr. 150.000,00 verða rindaðar við byrjan í oktober 2009, meðan restin kr. 100.000,00 verður rindað, tá ið uppgávan verður latin, t.v.s. januar/februar 2010.

Tíðarætlanin er, at byrjað verður í oktober 2009 og arbeiðið verður liðugt 1. februar 2010.

Kommunan gevur Farec International v/Óla Samró heimild til at presentera seg sum ráðgeva vegna Fuglafjarðar kommunu.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 18. september 2009. Á fundinum greiddi borgarstjorin frá teimum fundum, sum verið hava við vinnuna og Eik banka um, m.a. viðurskiftini í sambandi við sølu av matvøruvirkinum til uppisjóvarfisk í Kollafirði (Kollafjørð Pelagic), sum bankin er eugari av. Hann las upp fundarfrásøgn millum bankan og kommununa tann 14. apríl 2009.

Fundir hava verið við umboð fyri P/F Bergfrost tann 21. apríl 2009 og við vinnuna tann 09. juni og 08. september 2009. Somuleiðis varð eisini komið inn á vinnufundin, sum hildin varð í Mentanarhúsinum tann 26. mai 2009, har bæði ávís umboð fyri politisku flokkarnar og vinnuna vórðu umboðað, har høvuðstemaið varð: Pelagiska vinnan 2010-2025 við Óla Samró. Á fundinum, sum varð ikki varð serliga væl umboðaður politiskt, hevði m.a. fiskimálaráðharrin og aðrar orðið og svaraðu spurninum á besta hátt.

Annars verður mett, at poliskur vælvilji er fyri einum tílíkum virki í Føroyum. Staðfest er á øllum teimum fundum, sum verið hava, at eitt matvøru- og mjølvirki búskaparliga eiga at liggja uppat hvørjum øðrum, og ikki hvørt í sínum plássi, sum talan hevur verið um seinastu mongu árini.

Komið varð eisini inn á vinnuviðurskiftini í Fuglafirði ídag, har virksemi er sera nóg minkað, grundað á at P/F Havsbrún ikki eins og undanfarin ár fær nøktandi rávørutilgongd, grundað á sera smáar kvotur,

sum tillutaðar eru nótaskipunum, serliga svartkjaft og makrel, somuleiðis sum einki virki er í landinum, sum kann móttaka uppisjóvarfisk til matna.

**Niðurstøða:**
Ein meiriluti í nevndini Sigurð S. Simonsen og Magnus S. Midjord mæla býráðnum til at heita á Farec um at gera eitt prospekt av einum pelagiskum konsumvirði í Fuglafirði fyri kr. 250.000,00, harav tær kr. 150.000,00 verða játtaðar inniverandi fíggjarár av konto: 222035 Íløgur – víðkan av havnarlagnum, meðan írestandi kr. 100.000,00 verða avsettar á fíggjarætlan kommununar fyri 2010.

Avsettar eru sambært broyttu fíggjarætlanina fyri 2009 kr. 1.900.000,00, meðan nýtslan hevur verið kr. 850.000,00. Sostatt er rúm fyri játtanini á fíggjarætlanini fyri 2009, so talan í hesum føri verður ikki um at heita á býráðið um eykajáttan, hetta sambært § 41, stk. 1,2 og 3 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Ein minniluti Kristina Toftegaard Larsen tekur fyribils ikki undir við meirilutatilmælinum, men mælir ístaðin til at:

Vinnan og kommunan í felag skulu fremja yvirordnaðar rammunr fyri gerð av einum matvøruvirki í Fuglafirði, somuleiðis sum hon saknar áhugan frá skipum og virkjum til at standa á odda fyri at fremja hesa spennandi vinnuætlan.

**Avgerð:**
Atkvøtt varð fyrst um minnilutatilmælið. Hetta fall. (1 atkv. fyri og 6 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu: Sigurð S. Simonsen, Dánjal Vang, Magnus S. Midjord, Jann Toftegaard, Petur Abrahamsen og Eyðun á Lakjuni). Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmælið og varð hetta samtykt. (6 atkv. fyri og 1 atkv. blonk. Blankt atkvøddi Kristina Toftegaard Larsen).

Meðan málið varð viðgjørt varð Elisabeth D. Eldevig ikki á fundi, við tað at hon metti seg verða ógjegniga í viðgerðini og støðutakanini í málinum. Hon hevði sett seg í samband við løgfrøðing, sum metti hennara ógjegni sæð út frá minnilutatilmælinum í málinum, sum beinleiðis nevndi vinnuna, sum Elisabeth er partur av.

**<u>Mál nr. 42/2009.</u>**

**Møgulig søla av goymslubygningi kommununar á havnarøkinum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá P/F Petur Larsen,, dagfest 20. august 2009um loyvi at leiga goymslubygning kommununar matr. nr. 239n á havnarøkinum í Fuglafirði.

Teir hava tørv á umleið 60 til 100 fermetrum til at goyma gamlar maskinur og annað í, sum ikki verður brúkt í gerandisdegnum.

Eisini hava Kristian Joensen og Gunnleif Jacobsen biðið um loyvi at lánt/leiga partar av bygninginum ávísar tíðir til m.a. umvælingar av bátum teirra.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini 08. september 2009, og mælir nevndin býráðnum til, at bygningurin, sum er 477 fermetrar tilsamans, á matr. nr. 239n verður lýstur til sølu, og at kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomin tilboð ella einki at taka.

Í hesum sambandi verður víst til Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

**P.s.** Eftir fundin hevur kommunan móttikið skriv frá Sea-Star Div ing um leigu/keyp av bygninginum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. (8-0).

**<u>Mál nr. 43/2009.</u>**

***Viðvíkjandi starvinum sum leiðari av Fuglafjarðar kvøldskúla.***

Ì sambandi við at leiðslubroytingar eru fyribils farnar fram í Fuglafjarðar skúla, har skúlastjórarnir síðan fyrst í áttatiárunum hava verið leiðarar av Fuglafjarðar kvøldskúla, so hevur kommunala fyrisitingin tann 26. august 2009 tosað við setta skúlastjóran Vagn Foldbo og varaskúlaskúlastjóran Tórhall Justinussen um nevndu viðurskifti.

Sambært samrøðuni við hesar upplýsti skúlastjórin, at hann kom at mæla býráðnum til at leingja starvstíðina hjá Tórhalli sum leiðara av Fuglafjarðar kvøldskúla fram til 01. juli 2010. Grundgevingin fyri hesi tíðaravmarking er, at varaskúlastjórin hevur farloyvi úr sínum starvi til 01. juli 2010, og at Tórhallur fyribils bert verður í starvi sum varaskúlastjóri inniverandi skúlaár.

Fuglafjarðar býráð hevur annars á fundi tann 25. september 2008 tikið avgerð um at seta fyribils setta varaskúlastjóran Tórhall Justinussen í starvið fram til 01. juli 2009, grundað á, at grundað á at Richard Johansen bert varð fyribilssettur skúlastjóri, og at hann var av teirri meting, at rættast varð at fáa annan persón at taka sær av leiðsluni av frítíðarundirvísingini.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 03. september 2009 og mælir býráðnum til, at leingja starvstíðina hjá Tórhalli Justinussen sum leiðara av Fuglafjarðar kvøldskúla veturin 2009-2010, t.v.s. frá 01. september 2009 til 30. juni 2010, treytað av góðkenning frá Mentamálaráðnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (8-0).

**<u>Mál nr. 44/2009.</u>**

**Mál viðvíkjandi fríðarundirvísingini veturin 2009-2010.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Fuglafjarðar kvøldskúla, dagfest 02. juni 2009 saman við uppskoti til frítíðarundirvísing veturin 2009-2010, og hvar heitt verður á kommununa vegna skúlan um at søkja Mentamálaráðið um at fáa játtaðan stuðul svarandi til hjáløgdu meting, sum í peningi er umleið kr. 290.000,00.

Hetta svarar til eitt undirvísingartímatal upp á 2.290 tímar. Veturin 2003-2004 brúkti skúlin umleið 1.300 tímar, meðan skúlin hevur nýtt 1.580 tímar veturin 2004-2005, veturin 2005-2006 1600 tímar, veturin 2006-2007 1.500 tímar og veturin 2007-2008 1.460 tímar, meðan talið fyri 2008-2009 ikki er tøkt í løtuni.

Somuleiðis søkir skúlin um heimildir sjálvur at taka støðu til onnur tilboð, um so verður, at okkurt av tilboðunum fella burtur, t.d. av ov lítlari undirtøku. Eisini verður biðið um at fáa heimild at laga tímatalið til lærugreinarnar, um so verður, at fullur stuðul ikki verður veittur av Mentamálaráðnum.

Mælt verður eisini til, at luttøkugjaldið verður kr. 200,00, um skeiðið er styttri enn 40 tímar og kr. 400,00 um skeiðið er longri enn 40 tímar.

Kvøldskúlin heitir eisini, eins og undanfarin ár, á kommununa um at avseta kr. 40.000,00 til rakstur, t.v.s. til rindan av kunngerðum, útgerð, ferðaendurgjaldi vm.

Kvøldskúlin hugsar sær at lýsa við nevndu tilboðum um miðjan september 2008.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í nevndini tann 15. juni 2009 og tók nevndin á fundinum fyribils undir við ætlanini, sum leiðarin av Fuglafjarðar kvøldskúla hevði gjørt og somuleiðis fráboðanini til Mentamálaráðið, dagfest 14. apríl 2009. Somuleiðis varð á fundinum samtykt at boðsenda nýggja skúlastjóranum, sum kemur at hava ábyrgd av økinum, til fundar eftir summarfrítíðina at umrøða bæði tíma- og fakbýtið.

**Niðurstøða:**
Mentamálanevndin hevur aftur havt málið til viðgerðar á fundi tann 03. september 2009 og mælir býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot við møguligum tilboðsbroytingum, og at søkja Mentamálaráðið um neyðugan studning upp á kr. 290.000,00, svarandi til 2080 undirvísingartímar (Almenn frítíðarundirvísing 1.720 tímar + frítíðarvirksemi 570 tímar). Haraftrat kemur so sestøk fráitíðaundirvísing við 210 tímum, sum Mentamálaráðið rindar við 100%-um, so talan er um tilsamans 2.290 tímar.

Kommunan rindar 50% av lønunum til lærarar í sambandi við vanliga frítíðarundirvísing, meðan Mentamálaráðið rindar hina helvtina. Ráðið rindar allar lønir til serstaka frítíðarundirvísing mett 210 undirvísingartímar.

Eisini verður mælt til, at skúlin fær heimild til at tillaga tímatalið til lærugreinarnar, um so verður, at fullur stuðul ikki verður veittur, og at skúlin somuleiðis fær heimild til sjálvur at taka støðu til onnur tilboð, um okkurt av tilboðunum av ymiskum orsøkum falla burtur.
Mælt verður býráðnum til, at luttøkugjaldið verður sum skotið verður upp kr. 200,00 fyri skeið styttri enn 40 tímar og kr. 400,00 fyri skeið longri enn 40 tímar galdandi frá 01. september 2008 at rokna.

Eisini er nevndin samd um at heita á fíggjarnevndina um av avseta neyðugan pening til rakstur. Í sambandi við møguligan ferðapening til avstaðislærarar, sum koma at undirvísa í kvøldskúlanum er niðurstøðan hjá fyrisitingini, at eingin heimild er at gjalda hesum almenna ferðaendurgjald, sum er kr. 3,20 fyri hvønn koyrdan kilometur, tá ið talan ikki er um ferðing í arbeiðsørindum arbeiðsgevarans, men til og frá arbeiðið, sum kemur undir aðra skipan undir Taks.

Nevndin samtykti somuleiðis, at forkvinnan saman við býráðsskrivaranum taka fund upp við skúlaleiðsluna skjótast gjørligt fyri at umrøða, um ikki møguleiki er fyri at skipa fyri øðrum kvøldskúlatilboðum enn teimum, sum vanliga verður lýst við, fyri m.a. at hava eina meiri breiða

samanseting av kvøldskúlatilboðunum, sum annars í stóran mun hava verið tey somu seinastu mongu árini.

P.s. Annars hevur fyrisitingin sent umsókn til Mentamálaráðið tann 14. apríl 2009 um fyribils góðkenning og stuðul til frítíðarundirvísing veturin 2009/2010.

**Avgerð:**
Tilmælið frá mentamálanevndini um góðkenning av Fuglafjarðar kvøldskúla veturin 2009-2010 varð samtykt. (8-0). Somuleiðis varð samtykt, at luttøkugjaldið fyri frítíðarundirvísingina (børn og ung) verður sett til helvt av kvøldskúlagjaldinum, t.v.s. kr. 200,00 fyri meiri enn 40 tímar og kr. 100,00 fyri minnni enn 40 tímar. (8-0).

**<u>Mál nr. 45/2009.</u>**

**Viðvíkjandi umsorgaranarbeiðinum í Luffustovu.**

Grundað á at Almannastovan hevur tikið avgerð um at avtaka stuðulin til umsorganararbeiði, verður kommunan noydd til at hugsa um, hvørji tilboð kunnu verða til tey eldru í býnum.

Neyðugur peningur er avsettur á endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri kommununa fyri fíggjarárið 2009 frá 25. juni 2009.

Sosiala nevndin leggur dent á, at tiltøkini hjá teimum eldru halda áfram, og at kommunan finnur eina loysn saman við eldrafelagnum Borgini, sum annars eigur hølir, sum tey dagliga nýta, somuleiðis sum nevndin fyri eldrafelagið er áhugað fyri, at kommunan flytur ítrivið, sum er í Luffustovu, yvir í lonina.

Eldrafelagið Borgin hevur verið á fundi við sosialu nevndina, sum kom við uppskoti um, hvussu kommunan fíggjarliga kann stuðla eldrafelagnum Borgini restina av árinum. Tað verður neyðugt at samstarva á økinum og leggja arbeiðið í Luffustovu saman við arbeiðinum í Lonini.

Uppskotið er at útgjalda kr. 55.000,00 til Borgina, sum er beinleiðis stuðul, sum kommunan hevur avsett á síni fíggjarætlan fyri 2009. Síðan hevur nevndin tikið avgerð um at flyta tiltøkini í Luffustovu til Lonina, har eldrafelagið Borgin fær kr. 45.000,00 aftrat teimum klr. 55.000,00, tað sum eftir er av árinum fyri aktiveringina.

Nevndin í eldrafelagnum samtykti á fundi 16. juni 2009, at tey vilja átaka sær hesa uppgávu fyri stuðul kr. 45.000,00 restina av árinum 2009. Kommunan kann síðan seta pening av á fíggjarætlanini fyri 2010, sum eldrafelagið kann søkja um eftir umsókn.

Sosiala nevndin hevur viðgjørt málið um umsorganararbeiði á fundi tann 24. august 2009, og mælir býráðnum til at taka undir við at flyta umsorganararbeiðið úr Luffustovu til hølini í Lonini, sum eldrafelagið Borgin eigur. Eftir fyriliggjandi er eldrafelagið Borgin áhugað í at taka sær av hesum arbeiði.

**Avgerð:**
Borgarstjórin tók málið av dagskrá eftir áheitan frá forkvinnuni í sosialu nevndini, við tað at málið tíverri ikki varð búgvið til støðutakan.

**<u>Mál nr. 46/2009.</u>**

**Viðvíkjandi leigusáttmálanum millum KFUM-K skótarnar og kommununa.**

Sosiala nevndin ynskir efir áheitan frá sosialu umsitingini og dagrøktini at leingja leigusáttmálan við KFUM-K skótarnar fyri bygningin á matr. nr. 338 og  339 í Fuglafirði, nú byggingin av nýggja dagstovninum á Kambsdali verður seinkað.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í sosialu nevndini tann 24. august 2009, og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við, at verandi leigusáttmáli við uppskoti til ískoyti millum KFUM-K skótarnar verður longdur fram til 31. desember 2010.

**Avgerð:**
Tilmæli frá sosialu nevndini varð samtykt. (7-0). Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Kristina Toftegaard Larsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 47/2009.</u>**

**Viðvíkjandi broytan av Stuðulspolitikkinum í Fuglafjarðar kommunu.**

Mentamálanevndin hevur á fundi tann 15. januar 2009 viðgjørt broyting av KAP 10 § 27, sum sambært góðkenning býráðsins frá 24. apríl 2008 sum sigur: "Fyri hvønn næming í

miðnámsflokkunum ella á hægri lærustovni, sum er bústiandi í kommuuni, kann ein upphædd áljóðandi kr. 1.000,00 verða latin í sambandi við utttanlandsferð".

Nevndin varð á fundinum samd um at mæla býráðnum til, at § 27 í "Stuðulspolitikkinum fyri Fuglafjarðar kommunu" verður broytt soleiðis, at ítróttarfólk, ið fara uttanlands fáa eisini stuðul áljóðandi kr. 500,00 fyri persónin og miðnámsflokkanæmingar ella lesandi á hægri lærustovni, fara úr kr. 1.000,00 fyri hvønn persón niður í kr. 500,00, eins og teir í § 26 nevndu næmingar 1.-10. flokk.

Grundin til at málið verður lagt fyri býráðið nú er, at nevndin hevur lagt til merkis, at nevnda álit als ikki er latið býráðnum eftir viðgerðina tíverri.

**Avgerð:**
Samtykt varð at beina málið aftur í mentamálanevndina til víðari viðgerðar, grundað á at býráðslimir ikki vórðu á einum máli um at lætta stuðulin til miðnámsnæmingar ella hægri lesandi úr kr. 1.000,00 niður í kr. 500,00. (8-0).

**<u>Mál nr. 48/2009.</u>**

**Mál viðv. lækkan av limatali í bygginevndini/arbeiðs- og hugskotsbókin fyri eldrabygging vm.**

Bygginevndin er komin fram til nøkur konkret uppskot, sum ein minni bygginevnd kann arbeiða víðari við. Bygginevndin metir, at arbeiðið er gjørt í stóra bólkinum. Seinasti fundurin í hesari bygginevnd varð hildin tann 18. mai 2009, og vónani forkvinnan Elisabeth D. Eldevig, at arbeiðið varð tikið uppaftur í heyst.

Uppskotið frá bygginevndini er, at talið av fólkum verður lækkað, so nevndin frá at verða 10 fólk fer niður í 4-5 fólk. Forkvinnan í bygginevndini mælir til, at trý fakfólk, sum hava hollar royndir innan eldraøkið, arbeiða víðari í nevndini saman við skrivaranum, somuleiðis sum forkvinnan í sosialu nevndini ynskir at verða eygleiðari í bólkinum, men ikki virka sum ein fastur limur í nevndini.

Bygginevndin mælir til at hesir persónar framhaldandi koma at verða í nevndini/arbeiðsbólkinum:
Sunniva á Lakjuni, leiðari á Giljagarði
Marianna Hansen, leiðari á Vesturstovu
Unna Næs Petersen, sjúkrarøktarfrøðingur

Sosiala nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 24. august 2009 og mælir býráðnum til at taka undir við uppskotinum frá bygginevndini.

**Avgerð:**
Tilmæli frá sosialu nevndini varð samtykt. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.35.

Dánjal Vang

Jann Tofetgaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sigurð S. Simonsen                                        Skrivari: Jákup Frants Larsen